# TILTØK

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17.
Mánadagin kl. 17.30 TIM 5 og ungdómsmøti kl. 20.

**Skúlin í Funningsfirði**
Missiónsvikan byrjar fríggjadagin 5. mars kl. 20.
Fuglafirðingar tala og Thaborkórið syngur.
Leygardagin 6. mars kl. 20 talar Regin Høgnesen og Streingjakórið á Glyvrum syngur.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20 Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v. Peter O. K. Olofson: 1 Thess 2,1-16.

**Missiónsvika í Æðuvík**
5.-7. mars við hesum møtum:
Fríggjakvøldið kl. 20 Martin R. Jacobsen
Leygarkvøldið kl. 20 Hans Pauli Højgaard.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við Martin R. Jacobsen og sunnukvøldið kl. 19 Møti við John Myllhamar.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6. fl., kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri.
Hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið 5. mars kl. 19.30 Kvinnubønardagur í Emmaus.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Jenis av Rana og Jens Lisberg.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jenis av Rana og Jens Lisberg.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**KFUM & K í Klaksvík**
Hósdagin kl. 20.30 Gospelkórið »Gleði« venur.
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Jóannes Jóhannesen, kl. 21 Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. fundur, har Levi Joensen og aðrir tala. Sunnukvøldið kl. 18 Evangel. fundur, har Levi Joensen og aðrir tala.

**Saron, Viðareiði**
Osvald Kjærbo og aðrir tala á møtinum í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Ung úr Betesda syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Sumba.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í VB húsinum leygardagin kl. 16 fyri menn og kvinnur, ung úr føroyska bíbliuskúlanum luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Toril og Niels Edvard Olsen.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Missiónshúsið í Sumba**
Missiónsvikan heldur fram fríggjakvøldið kl. 20 við Pól Johannessen, Kórið av Tvøroyri syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 við Pól Johannessen, Mourits Viderø syngur og sunnukvøldið kl. 18 við Tummas Juul Askham, Kórið úr Porkeri syngur.

**Betania, Sumba**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 8. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Føðingardagur og ársfundur verður 12. mars. Val verður av tveimum nevndarlimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.
***Týsdagur 9. mars***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Frásøgn úr Noregi, Jórun Simonsen
**Tilmelding til Noregsferðina, ið verður 2.-10. august á tlf. 316491**
***Mikudagur 10. mars***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 15 Túrur
**kl. 17-21 Opið hús**
***Hósdagur 11. mars***
kl. 10-110.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
**Ongin matgerð**, Anne Grethe Harlou
***Fríggjadagur 12. mars***
**Ársfundur, føðingardagur – Tilhaldið verður 6 ár.**
kl. 14 Nevndarval
kl. 16 Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum Hans Pauli Strøm
kl. 16.30 Speakers corner
kl. 17 Havnarkórið Ólavur Hátún. Drekka og lagkøka í kjallaranum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 8. mars***
5. brot úr skaldsøguni Lognbrá eftir Heðin Brú verður lisin.
***Mikudagin 10. mars***
Upplestur

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 8. mars***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 9. mars***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 10. mars***
Hugnaløta – Jákup Højgaard, skipari
***Hósdagin 11. mars***
Opið hús
***Fríggjadagin 12. mars***
Vit tøva ull

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks. Ver hjartaliga vælkomin í Fløvan.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237.
www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr.: deaf_deaf.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839
faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16-18. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**LISA -**
*Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu*
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo



# Nordbil letur nýggjan Skoda Fabia til HB

**Í sambandi við at tað í ár eru liðin 100 ár síðan Havnar Bóltfelag varð stovnað, hevur felagið gjørt avtalu við Norðbil um at lata ein nýggjan Skoda Fabia.**



*Hósdagin bleiv bilurin handaður hjá Norðbil v. Oyggjarvegin, f.v. Jan Falkenberg, næstformaður í HB, Birgir Dam Jacobsen og Frits Dam Jacobsen, frá Norðbil, og Bárður Johannesen, 1. málmaður hjá HB* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað serliga við hesum bili er, at Team 85 hevur skrýtt bilin, soleiðis at hann er átøkur leikbúnanum hjá HB, umframt at serliga 100-ára búmerki eisini er at finna á bilinum, sum uttan iva verður sera sjónligur í gerandisdegnum.

HB hevur nógv jørn í eldinum í sambandi við 100-ára haldið, og fer hetta ivaleyst at krevja nógva koyring. Norðbil, sum eisini umboðar Honda og Hyundai hevur altíð stuðla ítróttinum, og siga teir seg vera fegnar um at kunna stuðla hesum stóra tiltaki.

Donsk/Týsk Grønlandsvitjan

# Í Føroysku Samkomuni Malta í Hirtshals

**Á evangeliska fundinum, sunnukvøldið 7.mars, fær føroyska samkoman, Malta í Hirtshals, áhugaverda vitjan av dansk/týsku hjúnunum Heidè og Renè Bryld, sum hava virkað sum trúboðarar í Umanaq í Grønlandi seinastu 4 árini.**

Tey koma at greiða frá trúboðaraarbeiðinum í Grønlandi, og koma eisini at siga frá teirra persónligu meting av missjónsarbeiðinum í dag. Tey koma at vísa myndir frá arbeiðinum, og børnini koma at syngja onkran grønlendskan sang.

Evangeliskt møti er hvørt sunnukvøld á Malta kl.18.00., men fyrsta sunnukvøld í hvørjum mánaði er sett av til at vera eitt danskt møti burturav, har tað bæði verður sungið og talað á donskum; og hetta møti, við Heidé og René, verður eitt danskt møti. Um tú kennir onkran á hesum leiðum, so ert tú vælkomin at siga viðkomandi frá møtinum komandi sunnukvøld á Malta, Vinkelvej 2 beint við gongugøtuna í Hirtshals - meiri centralt kann tað neyvan verða!!!

Heidé og René eru eini ung hjún, fyrst í tríatiárunum, við fimm børnum: Kasper, Marte, Sara, Lea og Maja. Heidé er úr Týskalandi, einum býi, sum liggur ímillum Düsseldorf og Køln, við navninum Dormagen. René er føddur og uppvaksin á Frederiksberg í Keypmannahavn. Hann er barnabarn hjá teimum vælkendu føroyavinunum í Keypmannahavn, Grethe og Henrik Thomsen, sum mangir føroyingar minnast frá møtunum í Thorsgade 40 á Nørrebrúgv.

Tey vóru bæði á bíbliuskúla hjá New Tribe Mission í Onglandi fyri 6 árum síðani, har eisini nógvir føroyingar hava gingið. Tá tey vóru liðug við skúlan gjørdu tey av at fara til Grønlands at virka sum trúboðarar. Tey siga sjálvi, at hesa avgerðina angra tey ikki, tí tey síggja andaliga tørvin klárari í dag, enn tá tey fyrst komu til Grønlands.

Tey gera nógv fyri at gera seg til eitt við fólkið í býnum, tí tey trúgva, at tað er treytin fyri møguleika at náa fólkið við evangeliinum, og eisini fyri at koma at kenna grønlendsku mentanina og grønlendska málið innanífrá. Við hesi persónligu kontaktini út til fólkið byggir tú eisini upp eitt náttúrligt vinarforhold við tann einkulta persónin, sum er av alstórum týdningi fyri trúboðaraarbeiðið her: Tey vitja inn í heimini, og eru við til ymiskar felags aktivitetir í býnum. René gongur til undirvísing í grønlendskum, tveir tímar um dagin, frá mánadegi til fríggjadag. Eisini hevur René arbeitt eitt skifti sum skrivari í rættinum í Umanaq, men tað hevur hann ikki stundir til nú, tí trúboðaraarbeiði krevur rættuliga nógv av hansara tíð.

Tey siga, at øll familjan er fallin væl til í Grønlandi, serliga børnini, sum sýnast at læra tað grønlendka máli væl, og onkur av børnunum tosar tað næstan flótandi, so tað líður væl, at tað verða børnini, sum koma at gera sítt til at læra foreldrini flótandi grønlendskt.

Hetta er fyrstu ferð, at tey vitja familjuna í Danmark og Týskalandi, síðani tey fóru avstað fyri fíra árum síðani. Tey hava verið í farloyvi síðani fyrst í august mánaða, og hesa tíðina hava tey vitjað kirkjur og samkomur bæði í Týskalandi og í Danmark.

Tey fara, um Gud vil, aftur til Umanaq seinast í juli mánaða, og so ganga tað allarhelst eini 4 - 5 ár áðrenn vit síggja tey aftur á okkara leiðum, men hvør veit um tey ikki tá leggja leiðina til Føroyar? - René eigur jú skildfólk í Føroyum, eina mostur í Vatnsoyrum og eina mostur á Glyvrum, og so eigur hann ikki minni enn 11 systkinabørn í Føroyum, og børnini hjá teimum eiga 25 trímenningar, so tað er nakað at koma eftir í Føroyum, og tað skulu tey eisini vera hjartaliga vælkomin til.

## GJALDOYRAKURSIR

*Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum*

| | | 04.03.04 | Ultimo febr. 2004 |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 613,5000 | 600,0900 |
| Bretland | **Pund** | 1118,4500 | 1112,2200 |
| Svøríki | **Króna** | 80,8700 | 80,7200 |
| Noreg | **Króna** | 86,2900 | 85,2900 |
| Sveits | **Frankur** | 471,8700 | 472,2400 |
| Ísland | **Króna** | 8,5800 | 8,5900 |
| Kanada | **Dollari** | 457,4700 | 444,6800 |
| Japan | **Yen** | 5,5436 | 5,4943 |
| | **Evra** | 745,2200 | 745,1900 |

FØROYA SPARIKASSI

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Undanfrumsýning
Billettprísur: 35,- kr.
4 billettir: 120,- kr.
Leygardagin 06.03. kl. 17.00
Sunnudagin 07.03. kl. 17.30



Leygardagin 06.03. kl. 19.00
Leygardagin 06.03. kl. 21.15
Leygardagin 06.03. kl. 23.30
Sunnudagin 07.03. kl. 19.45
Sunnudagin 07.03. kl. 22.00



Leygardagin 06.03. kl. 23.00
Sunnudagin 07.03. kl. 22.30



Leygardagin 06.03. kl. 20.45
Sunnudagin 07.03. kl. 20.15



Billettprísur: 45,- kr.
Leygardagin 06.03. kl. 16.30
Sunnudagin 07.03. kl. 16.15



Billettprísur: 65,- kr.
Leygardagin 06.03. kl. 18.30
Sunnudagin 07.03. kl. 18.15

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu